FISKIMÁLARÁÐIÐ

Fiskivinnustovan
27.08.2026
Fiskiloyvi nr. 71856

Kvotaskjal

P/F O. C. Joensen
Bryggjan 5
Postsmoga 40
420 Hósvík

Hjálagt sendir Fiskimálaráðið fiskiloyvi:

**Jákupsskel á leiðini eystanfyri Nólsoynna**

Ministry of Fisheries
Heykavegur 6A • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Fiskivinnustovan
27.08.2026
Fiskiloyvi nr. 71856
Kvotaskjal

# Fiskiloyvi

## Jákupsskel á leiðini eystanfyri Nólsoynna

Fiskiloyvið er latið samsvarandi ásetingum í § 2, stk. 1 nr. 6, § 4 og § 6 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi.

| | |
|---|---|
| **Eigari:** | P/F O. C. Joensen |
| **Skip:** | NORÐHEIM |
| **Kallimerki:** | XPRI |
| **Havnakenningarmerki:** | FD 795 |
| Gildistíð: | Frá: 27.08.2026 |
| | Til: 31.03.2027 |

Hetta loyvið gevur í gildistíðini veiðirættindi og áleggur skyldur og treytir sum ásett í loyvinum.

**Veiðirættindi:**

:

**Reiðskapur:** Dregg

Ulla Svarrer Wang

Avrit

**Treytir**

1. Skiparin skal fylgja teimum reglum, sum galda fyri fiskiskap á føroysku landleiðunum.

2. Skiparin skal
a) boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, tá túrur byrjar og tá túrur endar (telefax +298 313981 ella teldupost vakt@vorn.fo) og nær og hvar ætlanin er at avreiða
b) tá avreitt verður uttanlands, í seinasta lagi ein tíma eftir at farið er at sigla, boða Fiskiveiðieftirlitinum frá veiðinøgd umborð flokkað eftir fiskasløgum og nær og hvar ætlanin er at avreiða.

3. Skiparin skal halda seg til galdandi føroyskar reglur um, at tað bert er loyvt at avreiða veiðina um eina góðkenda innvigingarskipan í Føroyum, og í útlandinum um eina innvigingarskipan, sum Fiskiveiðieftirlitið hevur góðkent.

4. Skiparin skal halda seg til føroyskar reglur um eftirlit við fiskiførum um fylgisvein.

5. Reiðarin/skiparin skal beinanvegin eftir landing senda Fiskiveiðieftirlitinum vektarseðilin. Eisini skal vera tilskilað, hvar veiðan er fiskað. Upplýsingarnar skulu sendast elektroniskt í tí sniði og eftir teimum krøvum, sum Fiskiveiðieftirlitið ásetir.

6. Skiparin skal gjølliga føra veiðidagbók samsvarandi galdandi kunngerð um veiðidagbøkur fyri føroysk fiskiførr, og leiðbeiningini um føring av veiðidagbók. Eftir hvønn túr skal frumrit av dagbókini sendast til Fiskiveiðieftirlitið, postboks 1238, FO-110 Tórshavn.

7. Skiparin skal halda treytirnar í kunngerð nr. 67 frá 16. mai 2012 um landingar og avreiðingar av fiski og fiskavørum.

8. Loyvið fevnir um beinleiðis veiði eftir jákupsskel. Hjáveiða av botnfiski er loyvd, men kann í mesta lagi verða 1% av samlaðu veiðini av jákupsskel fyri loyvistíðarskeiðið.